VINNUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF TRADE AND INDUSTRY

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 27. mai 2026
Mál.: 26/12489
Viðgjørt AE
Tygara skriv: 52-106/2026

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-106/2025 frá Bill Justinussen, løgtingmanni, settur landsstýrismanninum í vinnumálum, Jacob Vestergaard, um vegastrekkið við Streymin

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær kann væntast, at vegastrekkið við Streymin fær eina varandi ferðslutrygga loysn?
2. Hvussu nógv kostar tað at broyta vegastrekkið, so ferðslan verður trygg?
3. Hvør loysn heldur landsstýrismaðurin er tann besta?

Svar til spurning 1, 2 og 3:
Ferðslutrygd skal altíð raðfestast, tá vegir og átøk verða gjørd, har ferðsluviðurskiftini ikki eru nóg góð.

Trupulleikin við ferðslutrygdini við Streymin er, at tað eru ov nógvar íbindingar á einum stuttum vegastrekki. Harumframt er sýnið frá íbindingini í Norðskála og út á høvuðsvegin ikki nøktandi, tí íbindingin liggur á innaru síðuni á einum svingi á høvuðsvegnum.

Fyri fýra áum síðani varð loyvda ferðin fram við vegamótunum lækkað úr 80 km/t. niður í 60 km/t. Í ár eru ferðgáar settir upp, sum vísa koyrdu ferðina. Ferðgáin blinkar, um koyrt verður ov skjótt.

Arbeitt hevur verið við eini loysn fyri alt vegastrekkið við Streymin síðani 2007, tá ið Løgtingið játtaði pengar til at kanna eina verkætlan, har vegurin frá Norðskála verður leiddur undir høvuðsvegin til Oyrarbakka. Arbeiðið varð boðið út, og tilboð kom inn upp á 4,2 mió. kr., men Løgtingið játtaði ikki neyðuga upphædd til at fremja verkætlanina.

Við hesi loysnini hevði lokala ferðslan millum Norðskála og Oyrarbakka ikki verið noydd at farið út á høvuðsvegin, og ferðslan hevði verið knýtt bæði betri og tryggari saman.

Henda loysnin fevnir eisini um eina minni rundkoyring inni á Oyrarbakka tætt við skúlan, har Magnstøðin, vegurin til Oyrarbakka, vegurin frá Norðskála, vegurin út á landsvegin og møguliga skúlin verða savnað í hesi rundkoyringini. Ein nýggj felags íbinding hevði verið gjørd Oyrarbakkamegin út á høvuðsvegin tætt við, har verandi íbinding er.

Landsverk metir, at nevnda loysn við undirføring er besta loysnin fyri alt vegastrekkið. Samlaða verkætlanin kostar umleið 15,0 mió. kr.

Landsverk og Sunda kommuna hava eisini umrøtt at gera eina stóra rundkoyring úti á landsvegnum. Harumframt er eitt annað uppskot kannað, har ferðsla frá øllum vegum verður stýrd við ferðsluljósum. Henda loysnin verður mett til at kosta umleið 5 mió. kr.

Ein avbjóðing við loysnini við stórari rundkoyring á landsvegnum og loysnini við ferðsluljósum er, at størri tillagingar mugu gerast við atkomuvegunum. Brekkan niðan móti Norðskálatunlinum kann verða ein avbjóðing hjá størri akførum, um tey skulu steðga við eitt vegamót áðrenn brekkuna, serliga um veturin.

Ferðsluviðurskiftini við Streymin skulu tó vera í lagi. Landsstýrismaðurin er sinnaður at arbeiða fyri eini loysn fyri alt vegastrekkið. Vónandi eydnast at fáa eina játtan til vegar til endamálið.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður